Keypssamtøkan í Vágum

FK Vágar søknast eftir

**Handilslærlingi**

at byrja 1. oktober ella eftir nærri avtalu.

Vit bjóða einum røskum fólki, gentu ella drongi, eina útbúgving undir skipaðum viðurskiftum í einum handli, har lív altíð er

**Arbeiðstíð:**
40 tímar um vikuna

Nakrar ferðir í lærutíðini verður farið á skeið í Danmark

**Lærutíð**
Hevur tú
- FHS er lærutíðin 3 ár
- HH er lærutíðin 2 ár
- HF/Student er lærutíðin 2 ár og 18 vikur

**Løn:**
Sambært S&K

Skrivlig umsókn, saman við møguligum próvskjølum skal í seinasta lagi 20. september 2006 sendast til:

FK Vágar
FO 370 Miðvági
att: Álvur Samuelsen
tel 332950 - 221130
as@fk.fo

Keypssamtøkan í Vágum

FK Vágar søknast eftir

**Fólki til deildina í Sandavági**

at byrja 1. oktober ella eftir nærri avtalu

**Arbeiðstíð:**
Um 20 - 25 tímar um vikuna (seinnapart)

**Vit rokna við, at tú**
- ert røkin
- ert blídlig/ur av lyndi
- ert álítandi
- ert fleksibul
- trívist væl við nógvum og fjølbroyttum uppgávum

**Løn:**
Sambært S&K

Umsókn skal vera okkum í hendi innan 7. september 2006, ella skjótast til ber.
Send nøkur orð um teg sjálva/n til

FK Vágar
FO 370 Miðvági
att: Álvur Samuelsen
tel 332950 - 221130
as@fk.fo

Danskur neurologur:

# - Framstig innan migrenugransking væntandi




*Steffen Birk hevði skeiðið í Miðlahúsinum leygardagin, sum Migrenufelagið skipaði fyri*

**- 16 prosent av landsins íbúgvum hava migrenu. Nógv orka verður løgd í at granska innan migrenu, og vit kunnu vænta okkum eina stóra menning í nærmastu framtíð, sigur Steffen Birk, sum hevði eitt skeið fyri migrenurakt í Miðlahúsinum leygardagin**

MIGRENA
*Orð & mynd*
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Leygardagin skipaði migrenufelagið fyri skeiði í Miðlahúsinum. Heilt fitt av fólki vóru møtt upp til skeiðið, sum danin Steffen Birk frá Dansk Migræneforbund hevði.

Av teimum uppmøttu vóru meginparturin konufólk. Tó vóru einstøk mannfólk eisini til staðar. Tey flestu av teimum, sum vóru í Miðlahúsinum leygardagin, hava migrenu, og tey lurtaðu væl eftir ráðunum frá danska serfrøðinginum. Eisini var høvi til at spyrja spurningar um ymiskt, sum lá teimum á hjarta.

Steffen Birk er glaður fyri at vera í Føroyum. Hann ætlar eisini at taka ferðina sum eitt upplivilsi og fer at halda frí í Føroyum. Steffen er neurolog og hevur tikið Ph.d innan migrenu. Hann hevur arbeitt nógv hjá Dansk Hovedpinecenter, og í løtuni fæst hann við gransking innan migrenu. Steffen metir, at tað er neyðugt fyri samfelagið at granska í migrenu.

- Síðstu 15 árini hevur menningin verið øgilig, og vit kunnu vænta okkum meira. Tað eru so nógv, sum hava migrenu, og tað sparir samfelagnum pengar, um vit kunnu menna rætta heilivágin. Tað er umráðandi, at vit fáa kunnað um okkara vitan, so at tey migrenu-raktu taka rætta heilivágin, sigur Steffen Birk.

Steffen metir, at tað er neyðugt at skipa fyri tílíkum tiltøkum, sum tað í Miðlahúsinum leygardagin, so at vitanin um heilivág kann breiðast út.

- Migrena er ein sera strævin sjúka, og hon kostar samfelagnum nógvar pengar.

Tølini vísa, at 16% av landsins íbúgvum hava migrenu. Tað er sjálvandi ymiskt, hvussu álvarslig hon er. Summi fáa kanska einans eitt migrenuálop um árið, men summi skulu dragast við tað hvønn dag. Við heilivági kunnu vit betra um lívsgóðskuna hjá teimum raktu og spara samfelagnum pengar við færri sjúkradøgum.

**Handilslærlingur**

**Vit søknast eftir lærlingi til HVS deildina hjá P/F Mariu Poulsen, Smyrilsvegur 8**

**Vit kunnu bjóða:**
Eitt spennandi starv, við dagligum avbjóðingum og góðum arbeiðsumhvørvi.

**Førleikakrøv:**
FHS ella HH er ein treyt fyri at byrja sum lærlingur í handilsvinnuni.

**Vit vænta at tú ert:**
Røsk/raskur, fyrikomandi og von/vanur við at fáast við fólk. Harafturat er tað ein fyrimunur um tú hevur aðrar royndir ella útbúgvingar innan handilsvinnuna, men hettar er eingin treyt.

Seinasta freist at senda inn umsókn við prógvum er, fríggjadagin 15. september 2006.

Eru spurningar, eru tygum altíð vælkomin at ringja á tel 31 20 00

pf Maria Poulsen
BOX 182 · FO-110 TÓRSHAVN

Sosialurin 341800